Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 12.12.2019 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208 Gerðabók
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.
Varalimir:
Ikki møtt:

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
157/19	19/01304-3	Áseting av fundardøgum 2020 – Klaksvíkar býráð
158/19	13/00899-162	Endurskoðan av ferðslutrygdarætlanini í 2020
159/19	19/00891-4	Vinarbýarsamstarv við Skt. Pætursborg
160/19	18/01402-44	Húsarhaldsskúli í Klaksvík - tryetað tilsøgn um stuðul
161/19	13/00759-86	Stuðul til Áhugafelagið Nólsoyar Páll – *eykajáttan, seinna viðgerð*
162/19	18/00496-63	Fíggjarætlan 2019, Klaksvíkar Býráð – *dagføring, eykajáttan, seinna viðgerð*
XXX/19 EYKAMÁL	19/01233-3	Systkinaavsláttur fyri ansing í Klaksvíkar kommunu

157/19
19/01304-3 Áseting av fundardøgum 2020 – Klaksvíkar býráð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	12.12.2019	157/19

Frágreiðing um málið:
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. Á seinasta býráðsfundinum í árinum avger býráðið vanliga, nær fundirnir fyri komandi árið skulu haldast.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2020:

- 30. januar
- 27. februar
- 26. mars
- 30. apríl
- 25. juni
- 24. september
- 22. oktober
- 26. november

- 28. mai
- 17. desember

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir í býráðshøllini - Nólsoyar Páls gøta 32, Klaksvík.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin:
§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotnu fundardøgunum fyri 2020.

158/19
13/00899-162 Endurskoðan av ferðslutrygdarætlanini í 2020

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	02.12.2019	34/19
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	02.12.2019	149/19
3 Tekniska Nevnd	04.12.2019	81/19
4 Fíggjarnevndin	10.12.2019	127/19
5 Klaksvíkar Býráð	12.12.2019	158/19

Frágreiðing um málið:
Í 2013 byrjaði arbeiðið við at endurskoða ferðslutrygdarætlanina hjá Klaksvíkar kommunu; ætlanin var liðug í apríl 2015.

Danski ráðgevin Rambøll stóð á odda fyri grannskoðanini, og tekniska fyrisiting stóð fyri innsavning av tekniskum forskriftum, kortum, ferðsluteljing, óhapsyvirliti o.a. Sum liður í ferðslugrannskoðanini var eitt umboð frá Rambøll í Klaksvík í 2014 fyri at gjøgnumganga ferðsluna, støðið av kervinum, skeltum, uppmerkingum, kantum o.a.

Tað hevur verið arbeitt miðvíst eftir ætlanini frá 2015, men av tí at ymiskar stórar verkætlanir hava verið framdar síðstu árini, ið hava havt stórt árin á ferðslumynstrið serliga í miðstaðarøkinum í Klaksvíkar kommunu, metti tekniska fyristing, at fortreytirnar fyri grannskoðanini broyttust, og at ein endurskoðan ikki skuldi fremjast, fyrr enn verkætlanirnar vóru komnar longri. Víst verður til nevndarkunning, dagfest 16-01-2019.

Verkætlanirnar eru nú komnar somikið áleiðis, at tekniska fyrisiting metir, at tíðin er búgvin til at endurskoða ferðslutrygdarætlanina enn eina ferð.

Endamálið er at fáa eina heildarætlan fyri alla kommununa, men tað er neyðugt at viðgera einkult útsett/ábær strekkir fyri seg. Her má eitt forarbeiði gerast, áðrenn farið verður eftir ráðgeva.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg 54 frá mai 2015 (ferðslulógin), Vejdirektoratet (DK) og Statens vegvesen (NO).

Fíggjarligar avleiðingar:
Grundað á endurskoðanina frá 2014 er kostnaður mettur til uml. 350.000 kr. uttan mvg.
Hædd má takast fyri, at innihaldið í endurskoðanini er ikki endaliga staðfest, ið kann viðføra bæði meira ella minni kostnað.
Áður er arbeiðið fíggjað av serligari játtan til *Ferðsluregulering* og av *Býarplanskontoini*.

Tilmæli:
Mælt verður til, at pengar verða settur av í 2020 og 2021 til at endurskoða ferðslutrygdarætlanina við serligum atliti til útsett/ábær økir, har tekniska fyrisiting fer í holt við tað neyðuga forarbeiðið til at umbiðja ráðgeva til endamálið.

Ferðslunevndin 2. desember 2019
Nevndin mælir umsitingini til at arbeiða víðari við at vísa á fíggingarleist. Samstundis verður heitt á umsitingina um at hava eitt prinsippuppskot klárt til viðkomandi nevndir og býráð at taka støðu til innan árslok 2020.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 2. desember 2019
Nevndin tekur undir við FeN 02-12-2019.

Tekniska Nevnd 4. desember 2019
Nevndin tekur undir við UBN 02-12-2019.

Fíggjarnevndin 10. desember 2019
Nevndin tekur undir við FeN og UBN 02-12-2019 og TN 04-12-2019.

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Tilmælið frá FíN 10-12-2019 einmælt samtykt.

159/19
19/00891-4 Vinarbýarsamstarv við Skt. Pætursborg

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	10.12.2019	135/19
2 Klaksvíkar Býráð	12.12.2019	159/19

Frágreiðing um málið:
Samskiftið hevur verið í longri tíð við umboð fyri Skt. Pæturborg, so ein vinarbýaravtala kann gerast millum partarnar. Samskiftið hevur verið sera gott, og hevur borgarstjórin saman við kommunustjóranum vitjað á russisku sendistovuni fyri nøkrum vikum síðani.

Russiski sendimaðurin í Danmark upplýsti, at guvernørurin í Skt. Pætursborg sá fram til at fáa vinarbýaravtaluna avgreidda og skeyt upp, at hetta verður gjørt fyrst í komandi ári.

Uppskot er gjørt til vinarbýaravtalu, og eitt ætlanarskriv fyri samstarv er eisini gjørt, ið millum annað

fevnir um at deila vitan.

Borgarstjórin hevur í samskiftinum lagt áherðslu á, at hetta samstarvið fyrst og fremst er fyri at knýta vinnuligu bondini millum londini bæði, og tí verður arbeitt við møguleikanum við at gera eina vinnuliga vitjan í Skt. Pætursborg einaferð í komandi ári.

Skt. Pætursborg er týðandi býur í Russlandi, sum er ein av størstu marknaðum hjá Føroyum fyri fisk og laks. Klaksvík er fiskivinnubýur, og tí eru stórir møguleikar í tøttum samstarvi við býin.

Skt. Pætursborg er við sínum stívliga fimm milliónum íbúgvum næststørsti býur í Russlandi. Í umleið 200 ár var býurin høvuðsstaður í Russlandi. Eitt skifti í 20. øld hevði býurin almenna navnið Leningrad, men í 1991 fekk býurin gamla navnið aftur. Skt. Pætursborg er havnabýur har vesturi í Russlandi við atgongd til Eystrasalt, og býurin hevur natúrligt samband við Norðurlond og vesturheimin sum heild. Skt. Pætursborg er kendur sum livandi býur innan vinnulív, mentan, útbúgving, list og ítrótt.

Ætlanin er, at Klaksvíkar kommuna fyrst og fremst serliga fer at hava samband við vakra býarpartin Pushkinsky.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við málinum, og at avtalan verður undirskrivað, so skjótt báðir partar hava møguleika til tess.

Fíggjarnevndin 10. desember 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-12-2019

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Tilmælið frá FíN 10-12-2019 einmælt samtykt.

160/19
18/01402-44 Húsarhaldsskúli í Klaksvík – treytað tilsøgn um stuðul

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	10.12.2019	136/19
2 Klaksvíkar Býráð	12.12.2019	160/19

Frágreiðing um málið:
Í mars 2016 vendi nevndin fyri Húsarhaldsskúla Føroya sær til Klaksvíkar kommunu við umsókn um íløgustuðul til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík.

Í skrivi dagf. 18. mars boðaði borgarstjórin nevndini frá, at málið varð viðgjørt av fíggjarnevnd og býráð. Samtykt varð fylgjandi treytað tilsøgn:

Klaksvíkar kommuna er sinnað at veita ein íløgustuðul á 18,5 mió.kr. við fylgjandi treytum:

- Stuðulin verður útgoldin, tá ið samlaða verkætlanin er liðug; skilt á tann hátt, at bygningurin lýkur øll myndugleikakrøv.
- At Húsarhaldsskúli Føroya eisini gera alt fyri at skaffa pening aðrastaðni til hesa stóru verkætlan.
- At landið setir 18,5 mió.kr. av til skúlabyggingina.
- Tilsøgnin gongur út um trý á frá dagfestingini av hesum brævi. Um verkætlanin ikki er liðug innan trý ár, fellur tilsøgnin burtur.

Henda tilsøgn er síðan longd, umframt ávísar treytir í samband við útgjaldið.

Í samband við hesa verkætlan hevur áhaldandi verið arbeitt við fleiri møguleikum fyri at loysa MVG-spurningin, sum er lýstur í notati hjá Tummas Eliasen, kommunustjóra, frá 30-10-2018, ið er hjálagt og eisini var partur av viðgerðini í mars-umfarinum 2019 og oktober-umfarinum 2018.

Tað verður framvegis arbeitt við at finna loysnir á hesum partinum, men í samband við tilsøgnina frá landinum, ið er neyðug fyri at byrja arbeiðið, hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið sett sum krav, at Klaksvíkar kommuna staðfestir sína tilsøgn um íløgustuðul til 21 mió. kr., íroknað MVG, heldur enn 18,5 mió. kr., umframt MVG.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Stuðulin er óbroyttur, tí er ikki talan um nakra broytta fíggjarliga avleiðing.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur undir við at upphæddin á íløgustuðlinum verður staðfest at vera 21 mió. kr., íroknað MVG.

Fíggjarnevndin 10. desember 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-12-2019.

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Tilmælið frá FíN 10-12-2019 einmælt samtykt.

161/19
13/00759-86 Stuðul til Áhugafelagið Nólsoyar Páll – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	19.11.2019	85/19
2 Fíggjarnevndin	26.11.2019	123/19
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	28.11.2019	153/19
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	12.12.2019	161/19

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 28. nov. 2019.

Mentanarnevndin 19. november 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12-11-2019.

Fíggjarnevndin 26. november 2019
Nevndin tekur undir við MeN 19-11-2019.

Klaksvíkar Býráð 28. november 2019
Tilmælið frá FíN 26-11-2019 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Tilmælið frá BýR 28-11-2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

162/19
18/00496-63 Fíggjarætlan 2019, Klaksvíkar Býráð - *dagføring, eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.11.2019	125/19
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	28.11.2019	151/19
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	12.12.2019	162/19

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 28. nov. 2019.

Fíggjarnevndin 26. november 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-11-2019.

Klaksvíkar Býráð 28. november 2019
Tilmælið frá FíN 26-11-2019 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Tilmælið frá BýR 28-11-2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

EYKAMÁL

xxx/19
19/01233-3 Systkinaavsláttur fyri ansing í Klaksvíkar kommunu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	03.12.2019	60/19
2 Fíggjarnevndin	10.12.2019	134/19

3 Klaksvíkar Býráð	12.12.2019	

Frágreiðing um málið:
Beinta Klakstein, trivnaðarnevndarforkvinna, hevur sent inn skriv við ynski um, at hetta mál verður viðgjørt í trivnaðarnevndini børn & ung og í fíggjarnevndini í hesum fundarumfarinum.

Beinta skrivar soleiðis:

Familjur sum hava fleiri enn 3 børn á dagstovni/ansing í Klaksvíkar Kommunu, skulu ikki gjalda fyri fleiri enn 3 børn. Tað vil siga, at hevur familjan fleiri enn 3 børn, so skulu tey ikki gjalda fyri 4 barnið o.s.fr.

Um tú hevur 4 børn á stovni í Klaksvíkar kommunu, harav tvey ganga í vøggustovu og tvey ganga í barnagarði, er mánaðarliga gjaldið kr. 4.414,- ella árliga kr. 52.968,-. Her er sysknaavsláttur á 25% íroknaður.

Um tú hevur 4 børn á stovni í Tórshavnar Kommunu er mánaðarliga gjaldið kr. 2.697,- ella árliga kr. 32.362,-. Her skulu foreldrini bert gjalda fyri yngsta barnið, tvs. um tað so er eitt vøggustovupláss, so er tað kr. 2.942,- um mánaðan men bert í 11 mánaðar. Tvs. at umroknað til 12 mánaðar, er tað kr. 2.697,- um mánaðan.

Tað merkir sostatt, at um ein familja við 4 børnum velur at búgva í Tórshavnar Kommunu ístaðin fyri Klaksvíkar Kommunu, so spara tey kr. 20.006,- árliga.

Um Klaksvíkar Kommuna sigur, at tað ikki skal gjaldast fyri fleiri enn 3 børn, so merkir tað, at árliga gjaldi hjá hesum familjum verður kr. 42.894. Tað er enn væl meira enn t.d í Tórshavnar Kommunu, men hetta er avgjørt ein bati.

Tað er í øllum førum rættiliga stórur munur á, og vit vita, at familjur við fleiri børnum, ofta hava tað fíggjarliga tungt. Eg haldi avgjørt at Klaksvíkar Kommunu skal rætta eina hond út til smábarnafamiljur og hetta kundi so hjálpt uppá tað.

Við vón um vælvild.

Umsitingin hevur ta viðmerking til hetta tilmæli forkvinnunnar, at tað er sera sjáldan, at familjur hava fleiri enn 3 børn í barnaansing samstundis, og tí eru fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommununa av hesum máli ógvuliga avmarkaðar, meðan tað fyri viðkomandi familju hevur stóra fíggjarliga ávirkan.

Vísandi til omanfyristandandi, verður málið lagt fyri nevnd til viðgerðar.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, sigur í § 6 um gjald, at "avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum standast av virkseminum sambært hesi lóg. *Foreldragjaldið skal tó í mesta lagi vera 30% av rakstrarútreiðslunum*".

Fíggjarligar avleiðingar:
Tað er sera sjáldan, at familjur hava fleiri enn 3 børn í barnaansing samstundis, og tí eru fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommununa av hesum máli ógvuliga avmarkaðar.

Tilmæli:

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 3. desember 2019
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá nevndarforkvinnuni, lýst í notati dagf. 29-11-2019.

Fíggjarnevndin 10. desember 2019
Nevndin tekur undir við B&U 03-12-2019.

Klaksvíkar Býráð 12. desember 2019
Tilmælið frá FíN 10-12-2019 einmælt samtykt.